## Adebayor rýmdi ikki

Álopsspælarin Emmanuel Adebayor sigur nú, at hann rýmdi ikki úr Arsenal fyri at forvinna meira pengar í Manchester City. Hann tívheldur um, at tað var venjarin hjá Arsenal, sum ikki vildi hava hann í felagnum longur, og sum tí seldi hann. – Wenger kann ongantíð siga, at eg vildi sleppa frá Arsenal. Eg fór, tí hann vildi hava meg at fara. Men tað fer Wenger ongantíð at viðurkenna, sigur Adebayor við ESPN.



## Rangers vann Old Firm

Stóri dysturin í skotskum fótbólti var á skránni um vikuskiftið, og uppgerðin millum Celtic og Rangers endaði við, at teir, sum hava verið omaná í hesum kappingarárinum, framvegis eru tað. Rangers, sum liggur á odda í skotsku fótbóltskappingini, vann dystin. Bert eitt mál kom, og tað gjørdi Rangers seint í dystinum, eftir at Celtic hevði fingið ein spælara útvístan. Rangers er nú 10 stig frammanfyri Celtic.

# Farvæl Føroyar og

**Eftir átta ár uttan summarfrítíð og við einum fastløgdum gerandisdegi, takka tveir av profilunum í føroyskum fótbólti seinni árini fyri seg á hesum sinni. Hanus Thorleifsson og Páll Mohr Joensen hava pakkað ryggsekkin. Næstu mánaðirnir verða brúktir í frumskóginum í Teilandi, omaná og undir aldunum í New Zealandi, á strendunum á Tahiti, í casinoum í Las Vegas og í pumpandi metropolinum New York**



rolant@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam

Hanus Thorleifsson og Páll Mohr Joensen hava pakkað viðføri og eru klárir at fara. Í morginárini seta teir seg í flogfarið, sum skal føra teir úr Keypmannahavn til teilendska høvuðsstaðin Bangkok.

Hvørja ferð teir báðir hava ferðast síðstu nógvu árini, hevur altíð minst eitt par av gaggum verið mest umráðandi viðføri at fáa í kuffertið. Annars hava teir ikki havt so nógv at hugsað um, tí á flestum fótbóltsferðum teirra, hava onnur fólk syrgt fyri øllum.

Í so máta er henda ferðin, Hanus og Páll nú fara undir, nakað heilt annað. Hon brýtur við alt tað, teir eru vanir við. Størsta broytingin er tann, at teir sjálvbodnir hava valt at lata gaggurnar standa í nakrar mánaðir. Við tí fylgir eisini ein kollveltandi broyting av gerandisdegnum. Hesin gerandisdagur – og her kemur triðja og mest spennandi broytingin – skal brúkast í fýra ymsum heimspørtum næstu fimm mánaðirnar.

At broytingin verður øgilig og avbjóðingin stór, eru teir báðir fótbóltsspælararnir ikki bangnir fyri at viðganga.

– Eg dugi nóg illa at finna metroina á flogvøllinum og eg áni ikki hvar Oyrasundskollegiið er, sigur Hanus fyri at líkasum at vísa, hvussu fremmant alt annað enn Føroyar í roynd og veru er fyri honum.

Sosialurin var á flogvøllinum í Kastrup og tók í móti teimum, tá teir báðir komu til Danmarkar leygarkvøldið. Teir báðir hava valt at heilsa upp á vinfólk, sum búgva niðri, áðrenn leiðin gongur út í víðu verð týsmorgunin. Hesar dagarnar skulu teir búgva á Øresunds kollegiet á Amager, men bara tað at finna tiltikna studentagarðin kundi skjótt blivi ein uppgáva í sær sjálvum, um tað ikki var fyri Páll, sum hevur vitjað har áður.

### Tríggir HB'arar í Teilandi

Av tí sama eru teir báðir eisini ómetaliga spentir upp á ævintýrið, sum stendur teimum fyri framman. Eitt ævintýr sum byrjar so langt burtur sum í Teilandi, men har føroyingar vera fyri teimum, tá teir lenda.

– Hans á Lag er har og vit fara at fylgjast við honum fyrstu dagarnar, greiða teir báðir frá. Sostatt vera tað tríggir mans, sum allir vóru við at gera HB til Føroyameistarar í fjør, sum fara at spáku í teilendsku strætunum, hvar hitin í hesum døgum liggur væl omanfyri 30 stig.

Ætlandi fara Hanus og Páll at brúka ein lítlan mánað í Teilandi, har teir, umframt at vitja í býnum Bangkok, eisini ætla sær út á ymsar oyggjar.

### Onga summarfrítíð í átta ár

Men hvussu ber tað til, at teir báðir hava gjørt av at biðja Føroyum og ikki minst fótbóltinum farvæl so brádliga?

– Vit hava báðir spælt fótbólt í nógv, nógv ár. Vit hava vant seriøst og miðvíst og tað kostar, greiðir Hanus frá og Páll er skjótur at leggja uppí.

– Tann einasta frítíðin, vit hava havt, hevur verið frá seint í oktober til fyrst í januar. So í átta ár havi eg ikki havt nakra summarferiu sum so, vísir Páll Mohr Joensen á.

Hann fortelur eisini, hvussu hesi átta árini øll hava verið meira ella minni skemaløgd hvønn dag.

– Sum fótbóltsspælari veitst tú næstan, hvussu hvør dagur á árinum sær út. Vit vita, at tað altíð er kavi í januar og februar og venjingin verður hareftir, og soleiðis koyrir tað víðari út á árið, fortelur Páll.

Og soleiðis sum tað hevur háttað seg hjá teimum báðum, so hevur tað altíð verið fótbóltur á skránni. Tá teir vóru yngri var tað eftir skúlatíð, og nú seinnu árini hevur tað verið eftir arbeiðstíð – umframt dystir um vikuskifti.

Hesum gerandisdegi hava báðir ynskt at sleppa burtur úr – í eina tíð um ikki annað. Men soleiðis var tað ikki fyri nøkrum árum síðani.

### Dreingjadreymurin sleptur

– Hevði eg verið 20 ár, so hevði eg ikki gjørt hetta, sigur Hanus avgjørdur og Páll er av somu sannføring.

– Fyri nøkrum árum síðani, tá eg var tað yngri, livdi eg í dreyminum um at enda í Premier League. Hesin dreymurin, um at sleppa at spæla fótbólt í stórum deildum uttanlands, er sleptur nú, sigur 23 ára gamli Páll Mohr Joensen.

Hanus greiðir síðani frá, hvussu teir báðir tveir hava rokkið nógv av tí, ið røkkast kann í føroyskum fótbólti.

– Hetta er sjálvandi í nógv minni mongdum, enn so nógvir aðrir, men vit hava báðir verið Føroyameistarar og vunnið steypakappingina, báðir spælt evropeiskan fótbólt og báðir luktað eitt sindur til landsliðið, umframt at hava spælt á ungdómslandsliðum.

Hanus Thorleifsson leggur dent á, at hetta eru alt upplivingar, sum teir ikki høvdu viljað verið fyri uttan og eru ómetaliga glaðir um, men at tíðin nú er búgvin at royna okkurt nýtt.

### Wildlife and vacation

At tað skuldi enda við eini so drúgvari ferð kring knøttin, var kortini ikki upprunaætlanin hjá teimum báðum. Alt byrjaði við, at teir í summar tosaðu um, at tað hevði verið stuttligt at farið at ferðast.

– Hanus hevur ein pápabeiggja í Hong Kong, og upprunaliga ætlaðu vit bara yvir at vitja hann, fortelur Páll. Henda lítla ferð endaði við at fevna um fimm mánaðir, har teir byrja í Danmark fyri síðani at fara til Teiland, Australia, New Zealand, Tahiti og USA

– Vit ætla at vitja frumskógin í Teilandi, uppliva náttúruna og taka kavaraskeið har. Vit fara at surfa, dykka og leypa við fallskíggja í New Zealandi. Á Tahiti verður tað strendurnar og sólina, vit fara at njóta, áðrenn vit fara at royna stórbýarlívið í USA. Ja, vit fara at royna eitt sindur av hvørjum, sigur Hanus Thorleifsson.

Drúgva ferðin hjá teimum báðum endar fyrst í julimánaði, tá teir eru aftur í Danmark. Har ætla teir at taka Roskilde festivalin við, áðrenn leiðin gongur heim aftur til Føroya.

### Føroyar og fótbólturin?

So er brennandi spurningurin, um Føroyar merkir fótbóltur? Fyri Hanus Thorleifsson er svarið rættiliga einfalt. Hann ætlar sær at koma í form nokk so skjótt eftir, at hann er komin heim, men roknar ikki við at blíva partur av besta liðnum hjá nøkrum felag beinanvegin.

– Tað vóni eg sjálvandi, men annars verður tað á næstbesta liðnum, sigur hann. Hjá Páll Mohr Joensen er støðan heldur øðrvísi. Beint nú hugsar hann upp á ongan máta um fótbólt.

– Eg haldi, at tað hevði verið stuttligt, um eg kom aftur til Føroya og fann út av, at eg gjarna vil búgva í eitt nú New Zealandi, fyri so at flutt har til og arbeitt í eina tíð, men nú fáa vit at síggja, sigur hann.

Hvussu verður og ikki, so hava báðir tveir slept Føroyum og fótbóltinum í eina tíð. Fyri framman liggur eitt ókent ævintýr, sum av álvara byrjar, tá teir seta seg í flogfarið móti Teilandi í morgin – hetta meðan fyrrverandi liðfelagarnir í HB venja á kavaklædda vøllinum í Gundadali, og Hans á Lag ger klárt at taka í móti teimum í sólini í Bangkok.



## Hanus Thorleifsson

**Hanus er 24 ára gamal og endaði kappingarárið í fjør við at spæla í HB. Er annars uppaldur á Skála og hevur eisini umboðað B36. Hevur vunnið FM og Løgmanssteypið, hevur spælt og vunnið Champions League-dystir við B36 og er skrásettur fyri tríggjar A-landsdystir, umframt at hava spælt á øllum ungdómslandsliðunum.**



## Páll Mohr Joensen

**Páll er 23 ára gamal og hevur altíð spælt við HB, burtursæð frá einum ári, tá hann spældi við NSÍ. Hevur vunnið FM og Løgmanssteypið við HB, umframt at hava spælt altjóða dystir við felagnum. Harumframt er hann eisini skrásettur fyri ein A-landsdyst – tað var venjingardystin móti Íslandi í fjør, sum Føroyar eisini vann.**